

*Anfinn Kallsberg, løgmaður og løgmansfrúan Berghild Kallsberg saman við tí eina av synunum Signari*



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður og varaløgmaður saman við konuni, Hildur Hermansen*



*Karsten Hansen, landsstýrismaður enn eitt skeið saman við konunu Gull-Britt.*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður saman við konuni Eydnu og børnunum Moniku og Anniku.*



*Páll á Reynatúgvu nýggjur landsstýrismaður saman við unnustu síni Kristinu Jóhannesen*



# Stór móttøka á Viðareiði

**Yvir hundrað fólk vóru til staðar hóskvøldið á Hotel Norð, tá Annfinn Kallsberg, løgmaður, saman við hinum báðum landsstýrismonnunum úr Norðoyggjum, Eyðuni Elttør og Karsten Hansen, vegna Føroya Landsstýrið skipaðu fyri móttøku í heimbygdini hjá løgmanni, Viðareiði**

MÓTTØKA
*Solby A. Eliasen*

**Viðareiði:** Borðreitt varð við stórum, køldum borði við alskyns sløgum av mati. Og meðan kvøldarsólin sendi sínar heitu strálur oman yvir bygdina, sótu gott hundrað fólk til borðs í hugnaligu matstovuni á Hotel Norð.

Tey vóru øll komin at hitta løgmann, Annfinn Kallsberg, Eyðun Elttør, oljumálaráðharran og Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharran.

Løgmaður lat væl at hesu móttøkuni og segði, at tað var sera hugnaligt og stuttligt, at so mong fólk høvdu leitað sær vegin til Viðareiðis hetta avbera vakra summarkvøldið.

Í viðmerking til, at tað var ein so vakur dagur at byrja nýggju landsstýrissamgonguna í, segði løgmaður tó, at ikki kann væntast, at veðrið altíð fer at vera so gott komandi fýra árini.

- Tað fer nokk at verða onkur illveðursdagur komandi fýra árini, segði løgmaður smílandi.

Nógv kend andlit vóru at síggja á hesi móttøkuni, millum annað var Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík saman við nøkrum umboðum fyri Klaksvíkar Býráð. Og Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa var eisini á Viðareiði hetta kvøldið.

Hetta var ein sera hugnalig og væleydnað løta á Viðareiði.



*- Eg helt, at tað kundi verið gott at hava eina móttøku uttan fyri Havnina eisini – so hví ikki á Viðareiði, segði løgmaður, sum her má sigast at vera í essinum, mitt í øllum góðgætinum*



*ógvan Gerðalíð og konan, Astrid, í hugnaligum práti við Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra og Rana Nolsøe, býðráðslim í Klaksvíkar Býráð*




*Veðrið var av tí allarfagrasta hetta kvøldið. Sólskin og tað rørdist ikki ein ond, so gestirnir nýttu eisini høvi til at standa uttanfyri og njóta ta stórslignu náttúruna á Viðareiði*



*Jógvan við Keldu, tingmaður og Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa vóru millum gestirnar, ið hugnaðu sær til móttøkuna á Viðareiði*



*Eyðun Elttør, oljumálaráðharri, var vælhýrdur hetta kvøldið. Tað bleiv tó ikki til nakran láturkrampa hesuferð*



*Summi fóru út at bíða til boðið varð til borðs, meðan onnur nýttu høvi til at sessast í gongini á hotellinum*


HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56




Leygardagin 08.06. kl. 20$^{30}$
Leygardagin 08.06. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 09.06. kl. 20$^{00}$
Sunnudagin 09.06. kl. 22$^{30}$




Leygardagin 08.06. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 09.06. kl. 20$^{30}$




Leygardagin 08.06. kl. 21$^{00}$
Sunnudagin 09.06. kl. 23$^{00}$




Leygardagin 08.06. kl. 18$^{00}$
Sunnudagin 09.06. kl. 17$^{30}$

☆ BIO ☆
KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu